# AA spennir seg út: Nýggj ruta

**Leygardagin fleyg Atlantsflog sín fyrsta túr á nýggju rutuni millum Vágar og Edinburg. Á hesi ferðini fingu fjølmiðlafólk og onnur innboðin høvi at "snodda" til nakað av tí, sum skotski høvuðsstaðurin hevur at bjóða**

NÝGGJ RUTA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi og Annika Petersen, sum starvast hjá føroyska flogfelagnum, tosa við fryntliga ferðaleiðaran og bussføraran*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Atlantsflog er nú farið undir nýggja rutu millum Føroyar og Edinburg.

Flogið verður leygarmorgun úr Vágum og heimaftur leygarkvøld. Meðan bíðað verður eftir heimferðini úr aftur Skotlandi leygarkvøld, fer flogfarið hjá Atlantsflogi til Zurich í Sveits eftir ferðafólki, sum vilja til Skotlands at spæla golf – og drekka whisky, sum onkur tók til á hesum fyrsta túrinum á nýggju farleiðini.

## Falcon Trawel

Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi, sigur, at tað er sveisiska felagið, Falcon Trawel, sum hevur biðið Atlantsflog flúgva rutuna millum Zurich og Edinburg – í fyrsta lagi fram til, 10. september.

- Hetta gevur okkum høvi til eisini at flúgva millum Føroyar og skotska høvuðsstaðin, og er hetta ein kærkomin møguleiki hjá okkum.

Magni sigur, at í økinum kring um Edinburg og Glasgow búgva 4 miljónir fólk móti teimum 400.000, sum búgva í Aberdeenøkinum, hagar Atlantsflog eisini flýgur og framhaldandi fer at flúgva.

Stjórin í Atlantsflogi heldur, at stórir møguleikar liggja í flúgvingini upp á Skotland, tá ið havt verður í huga, at ikki færri enn 60 miljónir fólk búgva í Stórabretlandi tilsamans.

- Hetta er ein liður í at útbyggja farleiðina til henda risa-marknaðin, sigur Magni Arge.

## Áhugaverdur býur

Á fyrstu ferðini hjá Atlantsflogi leygardagin fingu innboðin eina hóming av, hvat Edinburg hevur at bjóða ferðafólki – og tað er ikki smávegis, antin tú hevur áhuga fyri søgu, mentan ella bara einum innkeypstúri.

Ein dagtúrur í Edinburg gongur skjótt, men er veðrið til vildar, kanst tú saktans njóta hvønn minutt teir 6-7 tímarnar, tú hevur í býnum – og áðrenn bussur-





*Myndin er tikin av Edinburg Castle og omanyvir vakra býin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Klub Sosialurin útferð til Edinburg

**Leygardagin fara haldarar og starvsfólk á Sosialinum útferð til Edinburg**

ÚTFERÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin skipar Klub Sosialurin fyri útferð til skotska høvuðsstaðin, Edinburg.

Við í ferðalagnum verða haldarar hjá Sosialinum kring landið og starvsfólk á Sosialinum.

Á marknaðardeildini hjá Sosialinum siga tey, at flogfarið hjá Atlantsflogi er fultsett, og tí sleppa ikki øll við, sum kundu hugsað sær hendan túrin saman við Klub Sosialinum.

## Ferðaætlan

Farið verður við bussi hjá Bussferðum av Farstøðini í Havn leygarmorgunin klokkan 07, og fráferðin úr Vágunum við flogfarinum hjá Atlantsflogi verður klokkan 09.15.

Ferðalagið lendir í Edinburg klokkan 10.45.

Fráferðin úr Edinburg býi við bussi út á flogvøllin verður klokkan 16.30, og klokkan 20.00 verður ferðalagið aftur í Vágunum.

Ferðaseðlarnir verða heintaðir á skrivstovuni hjá Atlantic Airways í Vágum.